**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**
*Occupational Safety & Health Administration*
Box 1134 ✶ Tlf. +298 357811 ✶ Fax +298 357810
Falkavegur 6 ✶ FO-110 Tórshavn ✶ arb@arb.fo

*Skrásetingar nr.:*
OY-E012-2

Hetta oyðublað fæst ókeypis á Arbeiðseftirlitinum

| Tilskilað Arbeiðseftirlitinum |
|---|
| Komið: |
| Jour. nr. |

# Bílegging av eiturevni (gift)

(Oyðublaðið skal skrivast við spjaldrastavum ella á maskinu)

| | |
|---|---|
| Øll fornøvn, eftirnavn: | Føðingardagur: |
| Bústaður | Post nr./Bygd/býur: |
| Útbúgving/starv: | Telefon nr. |

Undirritaði, ið hevur fylt 18 ár, søkir um loyvi til keyp av:

| | |
|---|---|
| Nøgd: | Slag av eiturevni/evnafrøðiligt navn: |
| At nýta til: | |
| | |
| | |
| | |

Eg vátti:

**at** nýta tað umbidna eiturevnið bert til omanfyri nevnda endamál.

**at** vísa mest møguligt umhugsni í samband við goymslu og nýtslu, soleiðis at fólk ella djór ikki verða fyri skaða orsakað av eiturevninum, og

**at** eg ikki vil lata nakran annan fáa fatur á eiturevninum.

Eg eri kunnugur við at brot á hesar kunna revsast eftir § 41 í løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi.

________________ Dagfest

________________ Undirskrift

Átekning frá Arbeiðseftirlitinum:

Við heimild í bekendtgørelse nr. 801 af 23. oktober 1997 om klassifisering, mærkning, salg og opbevaring af kemiske stoffer og produkter § 32, sum sett í gildi við kunngerð nr. 11 frá 13. februar 1997 um evni og tilfar § 1, stk. 1, nr. 4, jb. tó stk. 2, loyvir Arbeiðseftirlitið keypi av :

________________ at nýta til ________________
Evni — Nýtsla

________________ Dagfest

________________ Arbeiðseftirlitið

Flýggja út frá:

________________ Navn og bústaður á Apoteki/handli

________________ Dagfest

________________ Undirritað

**Vegleiðing um handfaring, goymslur o.a. er á baksíðuni.**

## Leiðbeining

### Útflýggingarloyvi.

Loyvið er treytað av, at felagið ella persónur, ið fær útflýggjað kemisk evni og tilfar – herundir eiturevnið, heldur galdandi reglur, eisini viðvíkjandi handfaring, goymslu og nýtslu av tí útflýggjaða evninum.
Útflýggjaða evnið/tilfarið má bert nýtast til tekniskt endamál, og ikki til medisinska viðgerð.
Henda áseting er heimilað jb. bekendtgørelse nr. 801 af 23. oktober 1997 om klassifisering, mærkning, salg og opbevaring af kemiske stoffer og produkter § 32, stk. 2 og § 33, sum sett í gildi við kunngerð nr. 11 frá 13. februar 1997 um flokking, innballing, merking, søla og goymsla av kemiskum evni og tilfar § 1, stk. 1, nr. 4

### Handfaring.

Til øll heilsuskaðilig evni og alt slíkt tilfar, skal latast ein góðkend brúkaraleiðbeining á føroyskum ella donskum máli, jb. kunngerð nr. 107 frá 4. juli 2001 um evni og tilfar § 16 og § 20.

Útvegari av evni og tilfari hevur skyldu til at geva allar neyðugar upplýsingar, sum skulu til, fyri at arbeiðið kann gerast so vandaleyst, sum tað í roynd og veru er gjørligt.

Alt evni og tilfar, sum kemur undir ásetta vandaheiti, skal verða týðiliga merkt eftir reglunum við vanda- og trygdarsetningum og fyriskrivaðum vandamerki. Evnið/tilfarið má ikki latast í annað ílat, sum ikki hevur somu merking jb. kunngerð nr. 107 frá 4. juli 2001 um evni og tilfar kapittul 3 .

### Goymslur.

Eiturevni skal goymast undir lási, sum bert kann opnast við lykli, sum er fráskildur øðrum lyklum og verður latin til nýtslu av leiðara ella øðrum ábyrgdarpersóni.
Hurðin til rúmið ella skápið, ið verður nýtt til hetta endamál, skal hava týðiliga merking, sum sigur frá, at eiturevni verður goymt her.
Tá kravt verður, at eiturevni skal goymast undir lási, verður eisini hugsað um, at børn ikki skulu hava atgongd til evnið/tilfarið.

Heimilað jb. bekendtgørelse nr. 801 af 23. oktober 1997 om klassifisering, mærkning, salg og opbevaring af kemiske stoffer og produkter kapittul 5, sum sett í gildi við kunngerð nr. 11 frá 13. februar 1997 um flokking, innballing, merking, søla og goymsla av kemiskum evni og tilfar § 1, stk. 1, nr. 4

### Persónlig verndarútgerð.

Arbeiðið við evni og tilfari skal leggjast soleiðis tilrættis, at hetta kann fara fram á ein tryggan og heilsugóðan hátt.
Alt eftir hvat slag av evni/tilfari talan er um, skal góðkend persónlig verndarútgerð og/ella serlig arbeiðsklæðir nýtast, fyri at verja viðkomandi arbeiðsfólk móti heilsuskaða.

Heimilað jb. bekendtgørelse nr. 746 af 28. august 1992 om brug af personlige værnemidler kapittul 2, sum sett í gildi við kunngerð nr. 131 frá 4. september 1995 um persónliga verndarútgerð, § 1, stk. 1

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**, hin 26. mai 2004

Karl Joensen, stjóri